

# Kanningin um Signar liðug

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Klokkan eitt í gjár skuldi formaðurin fyri nevndini, ið hevur kannað embætisførsluna hjá Signar á Brúnni, meðan hann sat sum landsstýrismaður, í samband við fíggjarstøðuna í Sjónvarp Føroya, handa løgtingsformanninum, Finnboga Ísakson útslitið.

Tað eydnaðist ikki okkum at fáa niðurstøðuna av kanningini, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Vit tosaðu við Signar á Brúnni beint undan middagsleitinum í gjár og hann var sjálvsagt ógvuliga spentur at hoyra hvat kanningarnevndin kom til. Einki var likið út frammanundan um hann var fríkendur, ella um hann fekk eina nøs í kanningini.

-Eg havi sagt tað fyrr og eg endurtaki, eg veit meg einki skeivt hava gjørt í hesum máli og havi eg gjørt nakað skeivt, so eri eg ógvuliga spentur at síggja hvat tað er, segði Signar á Brúnni við Sosialin í gjár.

Tað hava verið nakrir beiskir mánaðir hjá Signar á Brúnni, nú meðan hann hevur sitið á síðulinjuni og minuttirnir ganga seint fram móti at hann fær at vita um hann verður fríkendur ella ikki.

Signar á Brúnni hevur fyrr sagt, at Høgni Hoydal er lopin frá avtaluni við at seta Tórbjørn Jacobsen í sessin hjá Signar. Einki skuldi henda við sessinum hjá Signari, fyrr enn kanningarnevndin var komin við einum úrskurði. Tað hevur eisini vakt undran, at Tórbjørn Jacobsen, sum nú situr í Signarsa sessi, var heitasti talsmaður fyri at fáa Signar frá í samband við fíggjarstøðuna í Sjónvarpinum og báðir eru í sama valdømi. Stjórin í Svf, Tróndur Djúrhus situr framvegis tryggur í stjórasessinum. Vána fíggjarstøðan í Sjónvarpinum hevur ikki fingið avleiðingar fyri hann.

# Ætlar at selja almennar ognir fyri at fíggja fullveldi

*Samgongan ætlar at selja almennar stovnar og fyritøkur fyri at fáa fígging til eina rímiliga skiftistíð. Hetta er tað, sum løgmaður sigur í ólavsøkurøðu síni*

Áki Bertholdsen

–Eg havi sjálvdan verið so spentur sum hesuferð. Men tíverri fekk eg ikki nógv at vita.

Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins sigur, at í nógvar mátar var ólavsøkurøðan hjá løgmanni eitt vónbrot.

– Hesi bæði árini, hendan samgongan hevur sitið, er fullveldismálið farið við øgiligari stórari orku, bæði politiskari og umsitingarligari.

–Og eg hevði vænta at fáa eina greiða fráboðan um, hvat nú skuldi henda. Men tað fekk eg ikki, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at hetta er eitt tekin um, at eftir teir tríggjar samráðingarfundirnir, sum hava verið, er fullveldismálið komið í barsilsneyð.

– Og løgmaður torir ikki at seta føðsilin í gongd, tí hann stúrir fyri, hvussu barnið fer at síggja út.

Formaður javnaðarfloksins sigur, at ólavsøkurøðan osar langt vekk av, at løgmaður ræðist úrslitið av fullveldissamráðingunum, og tí roynir hann at draga málið út. Tí gevur hann heldur onki greitt svar uppá, hvat nú skal henda.

### Fíggja fullveldi við almennum ognum

Jóannes Eidesgaard heldur kortini, at ein avgerandi, men skelkandi avdúking var í røðuni hjá løgmanni.

Og tað er, at nú tað er greitt, at landsstýrið ikki fær eina rímiliga skiftistíð frá dønum, er ætlanin at selja almennar ognir fyri at samgongan sjálv kann fíggja eina rímiliga skiftistíð.

Tað, sum formaður javnaðarfloksins sipar til, er at í røðuni boðaði løgmaður frá, at ætlanin er at seta ein serligan skiftisgrunn á stovn, har peningur skal setast í, sum so skal brúkast at fíggja eina rímiliga skiftistíð við.

– Samstundis boðaði løgmaður frá, at sakkøn fólk skal setast at gera uppskot um at selja almennar stovnar og fyritøkur.

– Somuleiðis boðaði hann frá privatiseringum í Strandferðsluni og at Postverkið skuldi gerast til privat partafelag, hóast samgongan áður hevur boðað frá, at hon varð blivin samd um tað øvugta.

Jóannes Eidesgaard sigur, at landsstýrið hevur fyrr kunngjørt, at ein ein rímilig skiftistíð er 15 ár.

–Men tað er púra greitt, at danir vilja bara ganga við til fýra ár. Tí ætlar samgongan at stovna sín egna skiftisgrunn.

– Mín spurningur er: Hvaðani skal samgongan fáa peningin frá, sum skal í hendan grunnin, tí onkustaðni skal hann koma frá

Formaður javnaðarfloksins sigur, at tað einasta, sum kann setast í grunnin, er yvirskotið á fíggjarlógini.

– Men tað er munar ikki nógv, tí brúk verður fyri meiri peningi enn so í grunninum.



*Fullveldið er komið í barsilsneyð og Anfinn Kallsberg torir ikki at seta føðsilin ígongd. Tað nýggjast er, at nú skulu fólkins ognir seljast fyri at fíggja fullveldið. So djúpt er tjóðveldisflokkurin sokkin, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins*

Jóannes Eidesgaard sigur, at skal skiftistíðin verða 15 ár, skulu fleiri milliardir til, fyri at uppviga tað, sum blokkstuðulin hevði verið hesi árini.

– Ætlanin hjá landsstýrinum at seta sakkøn fólk at meta um virðini av almennum ognum og at gera uppskot um, hvussu tær kunnu seljast, kann tí bara merkja, at ætlanin er at fíggja hendan grunnin við at selja almennar ognir.

–Sostatt er ólavsøkurøðan ein fráboðan um, at landsstýrið ætlar at seta Carragata politikkin í verk, ikki fyri at fíggja uttanlandsskuldina, sum Carragata skeyt upp, men fyri at fíggja skiftisgrunnin.

– Sostatt skal Føroya fólk eisini fyrireika seg til, at teirra ognir, eitt nú Føroya Banki, Framtaksgrunnurin, Føroya Tele, trolararnir í Klaksvík og aðrir stovnar og aðrar fyritøkur, skulu seljast, fyri at fíggja fullveldið.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hetta er fólkaflokspolitikkur burturav.

– Sostatt mugu vit eisini einaferð enn staðfesta, at tjóðveldisflokkurin hevur start seg so blindan uppá fullveldið, at hann er til reiðar at seta allar sínar fíggjarligu og samfelagsligu hugsjónir til viks fyri at røkka málinum.

Jóannes Eidesgaard væntar tó, at hetta fer at raka samgonguflokkarnar sum ein boomerang.

– Hvat fer vanligi føroyingurin at siga, tá ið Den Danske Bank hevur keypt Føroya Banka aftur. Tí hvørjir aðrir keyparar eru, spyr hann.

Og hvør fer at keypa Atlantsflog, uttan fyrst og fremst Maersk?

Formaður javnaðarfloksins sigur, at ein annan tanka torir hann ikki at hugsa til endans.

– Landsstýrið hevur fyrr bjóðað dønum oljuna í pant, men tað gekk ikki.

– Hava vit so ikki eisini loyvi at spyrja, um samgongan nú tekur stigið fult út og fer at bjóða altjóða oljufeløgum oljuna í pant fyri at fíggja fullveldið, spyr hann eisini.

# Fiskidagar til lemmatrolarar

*Jørgen Niclasen heldur, at lemmatrolararnir mugu koma undir eina fiskidagaskipan, um skipanin við fiskidøgum skal mennast til eina fullborna skipan, sum tryggjar, at endamálið í lógini um vinnuligan fiskiskap verður uppfylt*

Ólavur í Beiti

Í morgin verður 1. viðgerð av uppskotinum hjá Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharra, um vinnuligan fiskiskap. Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur fiskimálaráðharrin um lemmatrolararnar, at tá fiskidagaskipanin varð tilevnað í 1996, og skipanin varð sett í verk, vórðu fiskidagar ikki ásettir fyri lemmatrolarar, samstundis sum kvoturnar vórðu settar úr gildi.

– Í staðin varð fiskiskapurin hjá lemmatrolarunum reguleraður við hjáveiðuprosentum fyri tosk og hýsu sum partur av veiðuni hjá hvørjum trolara sær. Henda skipanin helt fram til á vári 1999, tá hjáveiðuprosentini vórðu sett úr gildi, og trolarunum varð tillutað ávíst tonsatal av toski og hýsu hvørt sær sum hjáveiðukvotu at fiskað á innaru fiskidagaleið.

– Fiskiskapurin á ytru fiskidagaleið varð sostatt ikki avmarkaður – hvørki við fiskidøgum, hjáveiðuprosenti ella hjáveiðukvotum, sigur Jørgen Niclasen.

### 1340 fiskidagar

Jørgen Niclasen sigur eisini í viðmerkingunum, at á fundum við felagið fyri lemmatrolarar er komið fram, at skipini ynskja at halda fram við verandi skipan. Men um so er, at skipini skulu undir fiskidagaskipanina, ynskti felagið, at bólkur 1 verður býttur í tveir undirbólkar, og at allir mugu hava møguleikan at býta um 1 fiskidag á innaru fiskidagaleiðini við 4 fiskidagar á ytru fiskidagaleið. Hetta fer at hava við sær, at veiðitrýstið ikki veksur á innaru fiskidagaleið, men flytur seg úteftir.

– Tá eisini lemmatrolararnir koma undir eina fiskidagaskipan, økjast møguleikar fyri tillaging av flotanum til fiskimøguleikarnar.

– Víst skal eisini verða á, at við eini fiskidagaskipan fyri lemmatrolararnar verður eitt mark sett fyri teirra heildardagatalið á ytru fiskidagaleið. Hetta letur upp fyri møguleikunum at taka hædd fyri støðuni hjá fiskastovnunum har (kongafiski og svartkalva) á ein heilt annan hátt enn undir verandi skipan, sigur fiskimálaráðharrin.

Og skotið verður upp í fyriliggjandi uppskotið, at lemmatrolararnir koma undir skipanina við fiskidøgum frá 1. september 2000 at roknað, og at teimum verður tillutað 1340 fiskidagar á innaru fiskidagaleið í komandi fiskiári. Sostatt verða 100 fiskidagar til hvønn av teimum smærru og 80 fiskidagar til hvønn av teimum størru.



# Fiskidagarnir skerjast 5%

*– Jørgen Niclasen byggir á tey tilmæli, hann hevur fingið og á onnur viðurskifti. Eitt nú byggir hann á semjuna ímillum samgonguflokkarnar um fullkomið frælsi at keypa og selja fiskidagar ímillum allar skipabólkarnar, uttan teir smáu útróðrarbátarnar*

Áki Bertrholdsen

Næsta ár skal fiskidagatalið undir Føroyum skerjast 5%. Tað heldur Jørgen Niclasen, landstýrismaður í fiskivinnumálum, er tað rætta.

Á Ólavsøku legði hann uppskot fyri tingið um at skerja fiskidagatalið 5% í næsta fiskiári, sum byrjar 1. September í ár og endar 31 august næsta ár.

Løgtingið skal hava ásett fiskidagatalið í seinasta lagi 18. august, tað er um 14 dagar.

Men sum nakað nýtt skulu teir stóru lemmatrolararnir nú eisini upp í fiskidagaskipanina, so at skipanin nú umfatar allan flotan undir Føroyum.

Men lemmatrolararnir verða býttir sundur í tveir bólkar, alt eftir stødd. Annars verða fiskidagarnir komandi ár soleiðis sum talvan vísir.

Jørgen Niclasen sigur, at hann hevur styðja seg til tey tilmæli, hann hevur fingið, umframt onnur viðurskifti, sum viðvíkja fiskiskapinum.

Hann hevur somuleiðis hildið seg til samgonguskjalið, har tað stendur, at fiskivinnnan skal mennast á marknaðarbúskaparligum burðardyggum grundarlagið og at fiskiríkidømið skal gagnnýtast við neyðugum varsemi so at tað gevur sum mest til samfelagsbúskapin Eisini hevur hann hildið seg til til semjuna ímillum samgonguflokkunum um fulla umseting av fiskirættindum við ongum avmarkingum fyri allan fiskiflotan, uttan útróðrarflotin.

### Mæla til at skerja

Jørgen Niclasen sigur, at í tilmælinum frá Fiskirannsóknarstovuni og í frágreiðing frá fundi í Ráðgevandi Nevndini hjá Altjóða Havgranskingarráðnum, verður greitt frá, at toskastovnurin er mettur at vera oman fyri lívfrøðiliga minsta markið, men at veiðutrýstið er ov stórt. Tí verður mælt til at veiðutrýstið á toskastovnin verður skert.

Fyri Føroya Banka verður mælt til sama veiðitrýst. Um hýsustovnin verður sagt, at hann er væl fyri og er væl oman fyri lívfrøðiliga minsta markið.

- Upsastovnurin verður mettur at vera sera lítil og væl undir lívfrøðiliga minstamarkið. Hóast ábendingar frá fiskiskapinum eru um, at onkur góður árgangur er á veg inn í fiskiskapin, verður ikki mett, at hetta fer at økja nógv um gýtingarstovnin, tí veiðitrýstið framman undan er so stórt. Tí mælir Fiskirannsóknarstovan til, at fiskidagatalið hjá skipabólkunum, sum royna eftir upsa, verður minkað munandi. Harumframt verður mælt til at varðveita gýtingarfriðingarnar og at skipanin um, at skip kunnu trýfalda sítt fiskidagatal, tá fiskað verður á ytru fiskidagaleið, verður tikin av.

- Fiskirannsóknarstovan mælir til, at skerjingar fyri toskastovnin verða framdar yvir 2-3 ár, meðan tiltøkini fyri upsastovnin verða settar í verk frá komandi fiskiári, tí stovnurin er so illa fyri.

### Ongin orsøk at skerja

Hinvegin halda hvørki Stovnsrøktarnevndin og Skipanarnevndin, at tað er nøkur orsøk til at skerja fiskidagatalið. Stovnsrøktarnevndin heldur, at upsastovnurin framhaldandi er í menning, og at toska- og hýsustovnarnir eru væl fyri. Nevndin leggur eisini dent á, at tann føroyski feskfiskaflotin er gamal, og at veiðievnini heldur versna. Grundað á hesi viðurskifti mælir nevndin til, at fiskidagatalið komandi fiskiár verður tað sama sum fyri verandi fiskiár.

Skipanarnevndin - undantikið umboðið frá Fiskirannsóknarstovuni - at ongar sannførandi lívfrøðiligar grundir eru fyri at broyta fiskidagatalið fyri fiskiárið 2000/2001. Henda niðurstøða er gjørd grundað á ta fatan, at ikki meiri enn 33% av stovninum skulu veiðast á hvørjum ári.

Umboðið frá Fiskirannsóknarstovuni tekur ikki undir við hesi niðurstøðu.

Fiskirannsóknarstovan ikki tekur undir við, at ikki meira enn 33% av stovninum í tali skulu veiðast. Mælt verður til, at minni enn ein triðingur av stovninum skal verða fiskaður árliga.

Skipanarnevndin vísir á, at kanningar aðrastaðni hava víst, at líðandi batar í veiðuevnunum kunnu vera so nógv sum 5% um árið, og at leggjast má upp fyri bæði lopum í veiðuevnum og í líðandi batum, tá fiskidagarnir verða ásettir. Nevndin ger tó onki uppskot grundað á hesi viðurskiftini, tí hon metir, at niðurskurðurin í fiskidagatalinum seinastu fiskiárini hevur tikið hædd fyri teimum líðandi batunum, og at onki tilfar er tøkt í ár, sum kann vísa á lop í tøknini.

Nevndin hevur einki uppskot um broytingar í fiskidagatalinum grundað á búskaparligar grundgevingar, men vísir til frágreiðingina seinasta ár.

| | | |
|---|---|---|
| Bólkur 1 A: | Lemmatrolarar við maskinorku minni enn 2100 HK | 700 fiskidagar |
| Bólkur 1 B: | Lemmatrolarar við maskinorku 2100 HK ella meira | 640 fiskidagar |
| Bólkur 2: | Partrolarar | 6.497 fiskidagar |
| Bólkur 3: | Línuskip yvir 110 tons | 2.401 fiskidagar |
| Bólkur 4 A: | Útróðrarbátar millum 15 - 40 tons | 4.238 fiskidagar |
| Bólkur 4 B: | Útróðrarbátar størri enn 40 tons | 4.180 fiskidagar |
| Bólkur 5: | Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu | 21.322 fiskidagar |
| Tøkir: | | 521 fiskidagar |

*Talvan vísir, hvussu Jørgen Niclasen heldur, at fiskidagarnir skulu býtast sundur ímillum teir ymsu skipabólkarnar. Lemmatrolararnir eru býttir sundur í tveir bólkar, bólk 1 A, sum eru teir minnu lemmatrolararnir og bólk 1 B, sum eru teir størru. Tilsamans fáa teir 15 lemmatrolararnir 1340 fiskidagar á innaru leiðum. Hvør fiskidagur á innaru leið kann býtast við fýra dagar á ytru leið. Tað skuldi flutt veiðitrýstið úteftir, heldur Jørgen Niclasen*

